# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Til minnis um mína elskaðu mammu**

## Jacobinu Sørensen

*Góða mamma – og ei gloymi,*
*alt tú var fyri meg.*
*Stigini tey aldri kámast,*
*Men skína rein og skær.*

*Góða mamma eg teg ei gloymi,*
*Hvar enn so leið mín ber,*
*Hvar eg so á foldum ferðist,*
*Tú við mína síðu er.*

*Nú ert tú í himnalandi*
*- og klødd í brúðarskrúð,*
*ein dag vit aftur hittast,*
*har heima í himnabúð.*

**Dóttir tín Finngerð**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Ragnhild Hansen**
Miðvági

doyði og var jarðað.
Takk til prest fyri hennara góðu orð.
Og takk til tykkara, sum hjálptu til við jarðarferðina.
Takk til starvsfólkið á Sýnuni fyri umsorgan.
Somuleiðis takka vit tykkum øllum,
sum fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðin,
og ikki minst tykkum, sum mintust hana
við at senda gávu til Miðvágs kirkju.

***Tí at lívið er mær Kristus, og deyðin ein vinningur***
*Filip. 1.21.*

*Fyri tey avvarðandi*
**Ólavur og Akku við familjum**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Mathilda Joensen**, vanliga nevnd Matilda í Líðini í Vági, andaðist á Eldrasambýlinum í Vági leygardagin, 82 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Mathildu, kunnu lata eina gávu til Eldrasambýlið í Vági, konta í peningastovnunum.

**Karstin Danielsen, Strendur**, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin, 35 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju hósdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Karstin, kunnu lata nýggja Missiónshúsinum á Strondum eina peningagávu, konta í Eik ella Føroya Banka.

**Joen Karl Antoniussen**, vanliga nevndur Karl á Morkranesi, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi 7. desember, 88 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi týsdagin kl. 18 heim í Kristianskirkjuna. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini.

# Klokkari í 25 ár

Seinasta sunnudag (2. sunnudag í advent) hevur Óli Debes verið klokkari í Gjáar kirkju í 25 ár.

Gjáar kirkja varð vígd trinitatis sunnudag 1929, og hesi árini síðani hava verið tríggir klokkarar. Sofus Debes (pápi núverandi klokkara) var klokkari frá fyrsta degi til 1935, Benadikt Johannesen var klokkari í nærum 50 ár, árini frá 1935 til 1983, og tá tók Óli Debes so við, og hann er klokkari enn.

Mest sum øll árini hevur verið ringt upp á gamla máta, men í fjør heyst varð automatisk ringing fingin til vega. Hóast kirkjuklokkan er tann sama, so ringir hon nú mest sum av sær sjálvari.



*Óli Debes hevur verið klokkari í Gjáar kirkju í 25 ár*

*Mynd: Sofus Johannesen*

# Realskúlamynd frá 1930



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin í 1930 av realskúlanæmingum framman fyri gomlu fimleikahøllina.

**Aftara rað f.v.:** Gunhild Evensen (dóttir provst Evensen), Esta í Funningsstovu, Jona Jacobsen, Fía Debes (Berg), Torbjørg Winther (Holm), Anna Alberg, Ása Mortensen (Vágsheyg), Helma Rubeksen (Michelsen), Ella Rubeksen og Helena Dam

**Fremra rað f.v.:** Tina (Mikk) Jacobsen, Ebba Kamban, Gunhild Michelsen, Ingebeth Højgaard og Inger Højgaard

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórun Dánjalsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 279)

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*

**Dagurin**
**9. desember. Rólvur**. Teir vita einki halgimenni at navni Rólvur ella Rudolf. Komið upp í álmanakkan í 1727.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## 50 ára føðingardagur

Týsdagin 9. desembur verður Annfinn Danielsen, venjari og fótbóltskonsulentur, Skúlagøta 4, Tórshavn, 50 ár. Hann er burturstæddur føðingardagin.